NS-cup um vikuskiftið

FLOGBÓLTUR

Flogbóltsfelagið Mjølnir hevur um vikuskiftið skipað fyri stórari Flogbóltskapping, og aftur í ár var tað Norðoya Sparikassi, sum var høvuðsstuðul og lat steyp og heiðursmerki. Sparikassin hevur í fleiri ár stuðlað flogbóltinum í hesari kapping, og Mjølnir takkar fyri hetta.

Leikt var í øllum deildum, og serliga spennandi var tað kanska at fáa at vita, hvørt av meistaradeildarliðunum fór at vinna, og harvið leika seg í finaluna í almennu steypakappingini hjá FBF, sum verður leikt á Hálsi í Havn tann 17. februar.

Finalunar vóru hesar:

Meistardeild kvinnur
Mjølnir-TB, 3-0

1. deild kvinnur:
Fleyr-KÍF, 2-0

2. deild kvinnur:
Mjølnir-KÍF, 2-1

Meistardeild menn:
Fleyr-ÍF, 0-3

1. deild menn:
SÍ-Mjølnir, 2-0

2. deild menn:
Fram-Mjølnir, 2-1

Kappingin var sum heild væleydnað.

Fleyr-ÍF, 0-3; (20-25, 17-25 og 15-25)

ÍF í steypafinaluni

ÍF vann seg fram í steypafinaluna, tá teir um vikuskiftið vunnu Mjølnir-kappingina

FLOGBÓLTUR, MENN

Mjølnir, sum higartil bert hevur tapt ein dyst í landskappingini í ár, megnaði um vikuskiftið ikki at leika seg í finaluna í Mjølnirkappingini. Men hetta hevði ikki so stóran týdning, um hugsað verður um steypakappingina hjá Flogbóltssambandinum, sum verður 17. februar, tí Mjølnir vann FK-kappingina í Havn og hevði sostatt longu kvalifiserað til steypafinaluna. Men liðið hevði hóast alt viljað vunnið sína egnu kapping, men hetta gekk ikki hesaferð. Ein av orsøkunum var kanska, at Trygvi H. Poulsen var skaddur, og hevði valt at halda frí um vikuskiftið, og at liberoin Arnfinn Guðjónsson var uttanlands.

Fleyr og ÍF

Men tað vóru í staðin Fleyr og ÍF, sum leygardagin kláraðu at leika seg í finaluna. Tí varð lagtu upp til ein spennandi dyst, tí higartil í landskappingini høvdu liðini vunnið hvør sín dyst ímóti hvørjum øðrum.

Innleiðandi dystin leygardagin vann ÍF 2-0 á Fleyr, og fyrsta settið leiktu liðini nøkulunda javnt upp ímóti hvørjum øðrum til støðuna A-16, men so tók ÍF dik á seg og vann settið 25-20.

Eisini tey næstu settini vísti ÍF, at teir vóru sterkari og vunnu klárt 25-17 og 25-15 og harvið dystin 3-0 og bæði beinini í steypafinaluni 17. februar í Havn.

Javnt góðir

Jugoslaviski leikarin hjá ÍF leikti ikki upp til sítt besta í finaluni, men ein hevur lagt til merkis, at Jákup Helgi er komin við á miðjuni í mun til byrjanina av árinum, tí liðið vinnur fleiri bóltar her nú enn fyrr. Annars skal eingin verða tikin fram um á ÍF-liðnum, tí allir leiktu javnt væl.

Hjá Fleyr var Klæmint Isaksen besti leikarin, men ein sá ov litið til Johannes Ejdesgaard, og eisini var hevað ov litið til miðjuna.

Men samanumtikið ein uppibroðin sigur til ÍF, sum nú kann gleða seg til ein spennandi dyst ímóti Mjølni tann 17. februar.

Fram aftast

Annars var hetta úrslitið í innleiðandi kappingini leygardagin:

1. ÍF
2. Fleyr
3. Mjølnir
4. Fram

Mjølnir-TB, 3-1

Mjølnir eisini í finaluna

Tað verða ikki bara menninir úr Klaksvík, sum skulu spæla steypafinalu. Kvinnurnar úr Mjølni tryggjaðu sær sín finalusess, tá vunnu egnu kapping sína

FLOGBÓLTUR, KVINNUR

Sum ofta nevnt fyrr, hevur TB-liðið havt javna framgongd seinastu tíðina, og enn einaferð prógvaðu tær, at tær ikki skulu avskrivast.

Liðið kláraði at vikuskiftið at leika seg í finaluna í NS-cup 2001 í Klaksvík, og megnaðu tær m.a. í innleiðandi umfarinum leygardagin at vinna á oddaliðnum Drátti.

Í finaluni møtti TB tí altíð vælleikandi Mjølnirliðnum, sum enn einaferð hevði klárað at leikt seg í finaluna.

TB best frá byrjan

TB kom best frá byrjan og vann 1. settið, men so fór Mjølnir-maskinaríið í gongd, og tær háluðu tvey tey næstu settini heim.

Eisini í fjórða setti var Mjølnir klárt á odda; heili 24-20, men við góðum spæli vann TB seg upp á A-24, men so fór luftin úr ballónini, og Mjølnir vann settið 26-24 og hvarvið dystin 3-1. Og samstundis høvdu tær tryggjað sær pláss í steypafinaluni í Havn 17. februar, har tær skulu møta Drátti, sum vann FK-kappingina í Havn.

Liðini liggja á odda í landskappingini og leiktu eisini í finaluni seinasta ár, og tá vann Mjølnir, so roknast kann við einum sera spennandi dysti.

Fótbólturin fer at fundast

FSF hevur boðað frá, at árligi fundurin, sum FSF hevur við feløgini undan ársaðalfundinum, verður í B36 húsinum leygardagin 20. januar

FÓTBÓLTSFUNDUR
Jákup Mørk

Aðalfundurin hjá FSF verður 3. mars í Norðurlandahúsinum, men áðrenn hetta fara feløgini at hava ein óformligan fund við FSF

Sum sagt er talan um ein afturvendandi fund, og verður hesin í mestan mun nýttur til at tosa um ymisk evni, sum verða tikin upp á aðalfundinum. Eitt slag av óformligum práti, har partarnir fáa høvi at koma fram við sjónarmiðjum sínum.

Fundarskráin

Skráin til fundin er sett saman av sjey lutum, og eru hesir:

1. Endurskoðaðar kappingarreglur fyri fótbólt
2. Disciplinerreglur
3. Leikdagar 2001
4. Dómaraspurningurin
5. Peningur fra Champions-League 1999/2000
6. Minstu krøv frá UEFA til feløgini
7. Lutakast um løgmanssteypið og steypakappingina hjá kvinnum.

Var VB fremst

Uttan at týdningin av nøkrum evni fram um onnur, so er einki at ivast í, at fleiri teirra tykjast sera áhugaverd.

Ikki minst tykist fyrsta pettið um kappingarreglurnar at kunna gerast áhugavert. Ein lutur í viðgerðini av hesum verður uttan iva reglan, um hvussu støðan skal gerast upp, um so er, at tvey ella fleiri lið eru ájøvn í stigum.

Í fjør kom hetta týðuliga til sjóndar, tá VB og HB fram móti endanum av kappingarárinum lógu lið um lið í bestu mansdeildini. Meðan VB metti, at mál á útivølli í innanhýsis uppgerðum áttu at telja við í slíkum føri, mettu teir í Havn, at hetta ikki skuldi teljast við. Endaliga úrslitið gjørdist at FSF mátti leita sær løgfrøðisliga hjálp, og var úrskurðurin tá, at mál í innanhýsis dystum als einki høvdu at siga í so máta.

Tað er væl møguligt, at hesin úrskurðurin løgfrøðisliga var rættur, men neyvan man hann hava verið í tráð við ætlanina við reglum um innanhýsis dystir.

Hendan varð nevnliga gjørd við tí fyri eyga, at tað (serliga í yngru deildum) ikki skuldi vera avgerandi fyri meistaraheitið, at eitt lið kanska hevur vunnið 20-0 á onkrum veikum liðið, meðan eitt annað lið, sum hevur eins nógv stig hevur vunnið móti sama veika liðið uttan dyst. T.v.s. við málmuninum 0-0. Hetta er onkuntíð komið fyri, har tvey lið kanska hava vunnið allar dystir móti øðrum liðum, fyri so at hava vunnið hvør sína innanhýsis uppgerð.

Sum reglan hjá FSF nú verður tulkað, hjálpir hon lítið í slíkum føri, tí hava liðini vunnið hvør sín innanhýsis dyst, hava mál, sum eru skotin í hesum, einki at siga, og verður tað tí aftur málmunurin, sum er avgerandi.

Nakað annað er so tað, at aðalfundurin helst bert ætlaði regluna at verða galdandi fyri yngru deildirnar, men hetta var so ikki staðfest nakra staðni í lóggávuni.

Skulu skikka sær betri

Petti tvey tykist somuleiðis at kunna gerast áhugavert, við tað at hetta kundi bent á, at feløg eins væl og leikarar framyvir kunnu revsast, um so er, at tey ikki handla í tráð við góðum ítróttasið.

Júst hvat og hvussu hetta petti fer at merkja, skulu vit ikki fara at gera nakrar gitingar um, men ikki er óhugsandi, at FSF ynskir at fáa hetta í fastari legu, soleiðis at sleppast kann undan óhpnum støðum. Eitt nú sum tá dómararnir hóttu við verkfalli í fjør. Nakað sum kanska eisini kemur at verða fevnt av fjórða pettinum í fundarskránni.

Nær verður løgmanssteypið

Viðvíkjandi triðja pettinum á skránni, so er størsta ivamálið helst, nær finalan um løgmanssteypið skal spælast.

Allir leikdagar eru annars longu ásettir fyribils av FSF, og kunnu hesir síggjast á www.football.fo, og neyvan verður nakað trætumál av hesum.

Seinnu árini hevur finalan verið leikt fyrst í juli, og er hetta eisini so smb. fyribils ásettu leikdøgunum, men ynski hevur eisini verið frammi um, at summi vilja hava finaludystin fluttan til ólavsøku. Hett er so eisini spurningur, sum má greiðast í felag við havnarfeløgini, men júst hvussu hetta kann gerast, er enn ikki endaliga greitt. Onkur fundur hevur verið um málið, men eingin verulig loysn er enn løgd á borðið, og verður tað neyvan fyrr enn á aðalfundinum hjá FSF.

Enda við lutakasti

Av trimum teimum seinastu pettunum, er tað avgjørt tað fimta, sum tykist hava størstan áhuga. Meira nevnt um evnið aðra staðni á hesum blaðsíðum, so tað skal ikki verða skrivað meira um her og nú.

Hvørji krøv UEFA setir feløgunum, kann eisini hugsast at hava samband við áðurnevnda spurning, meðan seinasta petti sjálvsagt eisini hevur áhuga.

Tá verður nevnliga drigið, hvussu innleiðandi umførini í steypakappingini skulu spælast, eins og tey liðini, sum eru styrkismett beinleiðis til bólkaspælið helst verða bólkaði her.

Aðalfundurin hjá FSF verður í Norðurlandahúsinum hin 3. mars.



Pauli Jarnskor verður nú venjari hjá ÍF, og málið er einki at ivast í. Fleiri heiðursmerki og allar helst úr gulli

Pauli Jarnskor skal venja ÍF

Komandi tvey árini verður Pauli Jarnskor venjari hjá ÍF, har hann skal royna at toga liðið upp aftur í fremstu mansdeildina

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Um vikuskiftið varð avgjørt, at Pauli Jarnskor komandi tvey árini skal verða venjari hjá ÍF.

Fyri Sosialinum váttar Pauli tíðindini, og sigur harumframt, at nýggja avbjóðingin so sanniliga er nakað, sum hann gleðir seg til at royna.

– Hetta er so at siga eitt nýtt kapittul fyri mítt viðkomandi. Eg havi verið við leingi sum spælari, men hetta verður so fyrstu ferð, at eg sleppi at royna meg sum venjara, og tað gleði eg meg til.

– Eg havi onkuntíð hugsa um hetta, og eg helt eisini, at tað var rætt av mær at royna hetta, nú eg hevði møguleikan, svarar Pauli, tá vit spyrja hann um orsøkina til hetta.

Málið er gull

Tá vit spyrja hann, hvørjar ætlanir hansara við ÍF eru, er Pauli skjótur at svara:

– Tað er at vinna deildina. Eg royni í hvussu so er altíð at seta høg mál, og hetta verður einki undantak í so máta. So er bara at vóna, at tað eisini ber til at røkka hesum.

Hvørt hann sjálvur fer at spæla við, hevur Pauli enn ikki gjørt av, men hann vónar tó, at hetta fer at bera til.

– Tað veldst alt um, hvørt eg fái nakran hjálparvenjara afturat mær. Fái eg tað, er hetta so als ikki óhugsandi. So hevði eg eisini kunna vunnið gull við øðru deild, sigur Pauli at enda.

Við hesum seinasta sipar Pauli til, at hann higartil hevur vunnið gull í 1. og 3. deild. Á besta GÍ liðnum hevur talan verið um 11 heiðursmerki, tey 19 árini hann hevur verið á liðnum. Harumframt varð talan eisini um gullmerki í 3. deild í 1988, tá Pauli spældi nakrar dystir á liðnum seinasta partin av árinum, eftir at hann hevði verið uttanfyri vøllin við beinbrotið í hálvt ár.